Álit

í

løgtingsmáli nr. 57/2025: Uppskot til løgtingslóg um at gera ábøtur og umvælingar í H-bygninginum á Landssjúkrahúsinum

Landsstýriskvinnan í almanna- og heilsumálum, Margit Stórá, hevur lagt málið fram 2. desember 2025, og eftir 1. viðgerð 4. desember 2025 er tað beint Fíggjarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 5. og 11. desember 2025, 6. og 9. januar og 9. februar 2026.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við landsstýriskvinnuna í almanna- og heilsumálum, Margit Stórá, saman við Landssjúkrahúsinum og Landsverki.

Ein samd nevnd hevur hesar viðmerkingar:

Nýggi bygningurin til Landssjúkrahúsið nevndur H-bygningurin er nærum liðugur. Talan er um nýggjan meginbygning til psykiatri, medisinska seingjadeild, føðideild, barnadeild, høvuðskøk og endurvenjing. H-bygningurin á Landssjúkrahúsinum er umleið 15.000 fermetrar og rúmini fleiri enn 500 í tali. Bygningurin er í høvuðsheitum liðugur, og umleið 60 prosent av H-bygninginum er tikin í nýtslu. Tað eru staðfestir lekar í H-bygninginum, og er tað ein av høvuðsorsøkunum til, at alt virksemið ikki er flutt inn. Vavið av lekum er stórt og eftir, at Landsverk hevur latið eina sýnsfrágreiðing gera, er greitt, at tað verður neyðugt at umvæla ella skifta vindeygu, skifta út hurðar umframt annað arbeiði fyri, at bygningurin gerst tættur og verður egnaður til endamálið. Harumframt er talan um nakrar avleiddar skaðar, ið eisini skulu umvælast.

Eftir at lekar vóru staðfestir í H-bygninginum, gjørdi óheft metingarfólk sýn og meting av H-bygninginum í apríl 2025. Sýnsfrágreiðingin varð latin Landsverki í juni 2025. Óhefti sýnsmaðurin metti, at kostnaðurin var 14,5 mió. kr. at umvæla manglarnar, tó so at eyka umfar av spurningum er ávegis í mun til sýnsfrágreiðingina. Orsøkin til trupulleikarnar við lekum er samansett og stavar sambært sýnsfrágreiðingini frá vantandi dygd í handverkinum, ónøktandi tilfarsvali, vantandi eftirliti og prosjekteringsfeilum. Tað vil siga, at tað snýr seg bæði um ábyrgd hjá stórarbeiðstakaranum fyri fasaduna og hjá høvuðsráðgevanum, serliga í sambandi við fakeftirlit.

Landsverk hevur við støði í sýnsfrágreiðingini sett seg í samband við partarnar í málinum fyri at frætta, hvørja støðu teir hava til sýn- og metingfrágreiðingina, og um partarnir hava í hyggju at umvæla og bøta aftur feilirnar og manglarnar, sum eru staðfestir í sýnsfrágreiðingini. Eingin ábending er higartil komin um, at teir vilja umvæla og bøta aftur feilirnar og manglarnar.

Landsverk ætlar at leggja gerðarrættarmál ímóti stórarbeiðstakaranum og høvuðsráðgevanum, tí partarnir ikki hava tikið stig til at umvæla og bøta aftur feilirnar og manglarnar. Í hesum sambandi

eru arbeiðstøku- og ráðgevaratryggingarnar, ið eru teknaðar í verkætlanini, eisini viðkomandi. Endalig støða um ábyrgd og endurgjaldskrøv verður tikin í sambandi við gerðarrættarúrskurðin. Hetta er eisini galdandi fyri viðgerðina í mun til teknaðu tryggingarnar og tilgongdina annars við verkætlanini. Nær ein væntandi gerðarrættarsak verður liðug, er torført at meta um, men tað kann helst gerast talan um ár, um tað ikki eydnast at gera semju.

Við støði í sýnsfrágreiðingini og kanningum, sum Landsverk saman við Landssjúkrahúsinum hevur sett í verk, hevur ráðgevi gjørt kanningar og er komin við dagførdari kostnaðarmeting av at bøta og umvæla lekarnar á klimaskerminum og umvæla fylgiskaðar. Samlaði kostnaðurin av ábótum og umvælingum er nú mettur at verða 32,8 mió. kr. Tá eru 2,5 mió. kr. íroknaðar, ið svara til tað arbeiðið, ið er og verður gjørt fyri at avmarka skaðar, ímeðan hetta mál er í viðgerð. Sambært tíðarætlanini hjá ráðgevanum verður mett, at alt arbeiðið verður liðugt á heysti í 2026.

Tað hevur skund at fáa H-bygningin lidnan. Tí er henda nýggja verklagslógin gjørd at fáa heimild til at gera avtalur um at gera ábøtur og umvælingar í H-bygninginum fyri 32,8 mió. kr. umframt 1 mió. kr. til gerðarrættarmál og sakarmálskostnað.

Farið er undir at fremja nakrar ábøtur og er ætlanin annars, at arbeiðini verða gjørd so skjótt sum gjørligt. Enn ber ikki til at siga, hvussu leingi tíðarskeiðið fer at vara, men tað verður helst stóran part av árinum 2026.

Undir hoyringini er komið fram, at neyðugt er at handla beinanvegin fyri at fáa bygningin tættan og fyribyrgja, at skaðin verður enn størri.

Til spurningin, um tað er nøkur trygd fyri, at hetta ikki hendir aftur, er upplýst fyri nevndini, at Landsverk ikki hevur boðið arbeiðið út, men fer at gera sáttmála við eina fyritøku, ið hevur fólk, sum gjøgnum áratíggju hava uppbygt royndir at arbeiða við vindeygum av hesum slag, aluminium.

Ráðgevin, ið er valdur at projektera og hava eftirlit, verður at fremja eftirlit fulla tíð. Ein orsøk til, at valt er ikki at gera útboðstilfar, er, umframt at spara tíð, at arbeiðið, ið er gjørt, í fleiri førum ikki er framt sambært projekteraðu loysnunum. Tí verður mett, at arbeiðið kann fremjast skjótari, og meira fæst fyri peningin á henda hátt.

Eitt nú er arbeiðið við vindeygunum ikki framt eftir forskriftunum og krøvini til vindeyguni, um t.d. hvussu nógvan vind tey skulu tola, eru ikki yvirhildin.

Undir viðgerðini hevur landsstýriskvinnan kunnað nevndina um møguliga áhugaósemju í sambandi við ráðgeving í sambandi við arbeiðið at tetta lekar. Hetta var nýggj vitan, ið ikki var viðgjørd.

Síðani hevur landsstýriskvinnan upplýst fyri nevndini, at Landsverk hevur viðgjørt málið og greitt landsstýriskvinnuni frá, *at hóast ráðgevingin ikki sjálv metti, at talan er um áhugaósemju, so er tað týdningarmikið, at eingin ivi kann vera um óhefta ráðgeving í sambandi við umvælingarnar í H-bygninginum.*

Við støði í hesi meting hevur Landsverk avgjørt at velja annan ráðgeva til víðari arbeiðið. Avgerðin er tikin fyri at tryggja óhefta ráðgeving og fyri at forða fyri, at møgulig áhugaósemja - verulig ella uppfatað - kann seta arbeiðið ella avgerðir í iva.

Landsverk hevur mett, at henda tilgongd er tann mest hóskandi við atliti at áliti, sakligheit og góðari fyrisiting. Almanna-og heilsumálaráðið er samt við Landsverki í hesum.

Landsverk hevur sagt, at tíðin er altavgerandi, um bygningurin ikki skal farast meir, og tí hava tey valt ikki at bjóða eftirlitið og sjálvt arbeiðið út.

Til spurningin, hvar Landsverk er í øllum málinum, og hvar ábyrgdin hjá Landsverki er, er upplýst fyri nevndini, at táverandi stjóri í Landsverki í 2016 valdi at gera sáttmála við nøkur privat partafeløg um at stýra verkætlanini, og hesi stovnaðu íognarfelagið til endamálið. Landsverk hevði tí ein minimalan leiklut. Stovnurin Landsverk hevur havt fýra deildarleiðarar fyri økið og tríggjar stjórar síðani. Í dag hevði stovnurin ikki havt útveitt projektleiðslu og stýring av einari verkætlan sum hesari.

Um alt gongur eftir ætlan, so verður allur H-bygningurin tikin í nýtslu við árslok 2026.

Við síðuna av verður arbeitt við endurgjaldskravi og roynt verður at fáa tryggingarnar at dekka so nógv av kravinum sum til ber.

Til spurningin um, hvussu nógvur peningur er nýttur uppá H-bygningin frá byrjan í 2008 til í dag, er fyri nevndini upplýst, at við hesi verklagslóg kemur samlaða upphæddin upp á 834,5 mió. kr.

Undir viðgerðini í nevndini hevur verið spurt, hvussu komið er fram til, at kostnaðurin av at gera ábøtur og umvælingar er mettur til 32,8 mió. kr., meðan sýnsfrágreiðingin metti 14,5 mió. kr. Til hetta hevur Landsverk upplýst, at sýnsfrágreiðingin fór ikki í smálutir, og at Landsverk síðan hevur gjørt neyvari metingar bæði uttan og innan í bygninginum og útfrá tí kemur til 32,8 mió. kr.

Landsverk hevur greitt frá, at *Fyrsta óhefta sýnið av lekunum í H-bygninginum varð gjørt og latið pørtunum á sumri 2025. Landsverk hevur í sambandi við sýnsfrágreiðingina sett eyka spurningar til grundalagið fyri kostnaðarmetingina hjá sýnsmanninum.*

Útrokningargrundarlagið varð ikki latið saman við óheftu sýnsfrágreiðingini, og tí er trupult at vita, hvat sýnsmaðurin hevur tikið við, og hvat hann ikki hevur tikið við. Tað tykist tó sum um, at sýnsmaðurin helst ikki hevur tikið við ymsar útreiðslur til eitt nú ráðgeving og fakeftirlit, rakstur av byggiplássi, verkætlanarleiðslu ella óvæntaðar útreiðslur, umframt at metingin um fylgiskaðar sannlíkt er alt ov lág. Harumframt eru eisini sakarmálskostnaðir, ið landið skal rinda í fyrsta umfari. Harafturat kemur, at Landsverk saman við ráðgeva og arbeiðstakara síðani hava staðfest aðrar og øðrvísi trupulleikar, sum hava við sær, at tað lekur.

Nevndin hevur fingið skriv frá Faerport II, har sagt verður, at *Glas/alu-facadusystemið, sum bleiv projekterað av Faerport II, er væl roynt í Føroyum við væleydnaðum úrsliti.*

Glas/alu-facadusystemið, sum bleiv projekterað av Faerport II, er ikki brúkt. Ístaðin valdi høvuðsarbeiðstakarin eina aðra líknandi loysn. Tað er nakað, sum ein arbeiðstakari hevur rætt til. Tó hevur hann ábyrgdina av, at valda loysnin er eins góð sum tann fyriskrivaða.

Til spurning frá nevndini, um hetta er so, og um Landsverk hevði kunnleika til hetta, varð upplýst fyri nevndini, at Landsverk kennir seg ikki aftur í hesum og kannað verður nú, um dokumentatión er fyri, at eftirlitið (Faerport II) hevur tikið fyrivarni fyri hesum. Nevndin fekk upplýst, at hesin spurningur eisini er partur av rættarmálinum, sum Landsverk arbeiðir við. Viðvíkjandi

fakeftirlitinum, so varð hetta eftirlitið framt við stakroyndum. Hevði man skipað eftirlitið til eina so stóra verkætlan í dag, hevði man havt eitt fult eftirlit.

Upplýst varð á fundinum, at nógvir av feilunum við eitt nú vindeygunum eru ringir at fanga hjá einum eftirliti; har vóru produktfeilir, ið týða á, at vindeyguni ikki eru testaði nóg væl á fabrikkini m.a. ymiskir tetningslistar og lásimekanismur, ið ikki virka sum ætlað.

Til spurningin um nýggja ráðgevarafyritøkan er samd í lagda leistinum fyri, hvussu arbeiðið skal fremjast, varð upplýst fyri nevndini, at felags fundir hava verið millum fyrrverandi og núverandi ráðgevarar um hetta, og at alt týðir uppá, at teir eru samdir um framferðarháttin.

Upplýst er eisini fyri nevndini, at Landsverk hevur fingið heimild frá Fíggjarmálaráðnum at brúka tøka játtan á 2,5 mió. kr. at tryggja, at bygningurin ikki ferst meir, meðan málið verður viðgjørt, og um neyðugt kann meir peningur útvegast.

Fyritøkan, ið ger sjálvt arbeiðið, heldur fram við arbeiðinum og fer nú at seta fleiri fólk inn at fremja arbeiðið.

Nevndin ásannar, at arbeiðið hevur skund, um skaðin ikki skal gerast enn størri.

Við hesum viðmerkingum tekur ein samd nevnd undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Fíggjarnevndin, 19. februar 2026

Eyðgunn Samuelsen forkvinna	Beinir Johannesen næstformaður	Bjarni Hammer
Dennis Holm	Hanna Jensen	Magnus Rasmussen
	Steffan Klein Poulsen	